Filadelfia, men um ta fyrstu samkomuna, sum vit lesa um í Ápostlasøguni. Tað var sera læruríkt at hoyra Wayne greiða frá samkomusøguni, og tað gevur okkum nakað at hugsa um, tá vit síggja hvussu langt samkoman flutti seg burt frá ætlan Heilaga Andans. Vit kenna øll til hvítusunnu og hendingina, tá Heilagi Andin fall og øll fóru at tala í tungum. Og gjøgnum Ápostlasøguna lesa vit hvussu samkoman varð fylt av Heilaga Andanum ferð eftir ferð. Í dag er tað fremmant fyri nógv at verða fylt av Heilaga Andanum og enn meir fremmand at tala í tungum. Eg síggi tað sum eitt av málum okkara, at vit mugu lata meira upp fyri Heilaga Andanum, so Andans manifestatiónir verða natúrligar okkara millum – eg meini ikki, at vit skulu verða løgin – men fylt av Andanum og tora at virka í Heilaga Andanum. Vit mugu flyta okkum fram til aftur at kennast við ápostlar, profetar, lærarar, hirðar og evangelistar okkara millum og framelska hesar tænastur. Eisini peikaði Wayne á í undirvísing síni, at vit fara at uppliva broyting á møtum okkara, so vit ikki koma sum áskoðarar, men sum luttakarar, og hetta má eg siga, at eg brenni fyri; tað er ofta hugstoytt at uppliva hvussu passiv vit eru á møtum, og tað kennist av tí sama, at flestu okkara eru áskoðarar. Hetta ynski eg at síggja broytt tey næstu komandi árini.

Eitt annað eyðkenni, sum tann fyrsta samkoman hevði, var felagsskapurin. Vit kenna orðini frá Ápostlasøguni kap. 2.: „Tey hildu trúliga fast við læru ápostlanna og við samfelagið, við breyðbrótingina og við bønirnar.“ Eisini hetta mugu vit flyta okkum fram til, so vit fáa sama eyðkenni sum tann fyrsta samkoman. Tey hildu trúliga fast við þeikar á eitt aktivt og kraftmikið samfelag, og ikki bara av og á og tá tað passar mær. Mær leingist so eftir at merkja ídni og brennandi áhugan at koma saman. Eisini stendur í sama kapitli: „tey lovaðu Gudi og vóru nógv umhildin av øllum fólkinum.“ Vit hava umrøtt og arbeitt við relatiónum í samkomuni, og eg hugsi at hetta er alneyðugt fyri okkum øll, um vit skulu flyta okkum fram til Guds ætlan fyri okkum. Og tað gleðiliga er, at júst relatiónir og at tosa um hvønn annan er so nógvar ferðir betur í dag enn tað hevur verið. Men vit eru als ikki komin á mál, og mugu áhaldandi flyta okkum, so vit brenna í kærleika til hvønn annan. 1. Pæt. 4.8: „Og havið fram um alt brennandi kærleika hvørt til annað, tí kærleikin fjalir fjøld synda!“ Hetta er vegleiðing Pæturs og eg hugsi, at hetta er vøksturin, sum vit áhaldandi mugu vaksa inn í. Eitt annað orð, sum eg verði mintur á er Róm. 12. 11: „Verið ikki flógv í íðinskapi tykkara, verið brennandi í andanum – tænið Harranum!“ Alt hetta, sum her verður peikað á, má so fylgja okkum langt út um bygning okkara, so vit megna at ávirka okkara samfelag, okkara bý, okkara umgangskreds o.s.fr. Latið okkum við treysti halda fram í broytingum Heilaga Andans.

*tj*

# Filadelfia

*„Himmal á jørð“*




Nú 50 ára føðingardagurin hjá Filadelfia er farin afturum, hevur onkur spurt: „Hvar er Filadelfia um 5 ár“, og onkur annar spurdi: „Hvussu sær Filadelfia út um 50 ár“. Um vit hugsa aftur til Filadelfia í 1973 og fram til dagin í dag, so var eingin, sum tá kundi ímynda sær ta mynd, sum Filadelfia lýsir í dag, og framtíðin hevur tað serkenni, at ting broytast til tað, sum vit ikki kenna, og tí ikki kunnu ímynda okkum. Eitt annað er at seta mál, og fyri tey næstu 5 árini, hevði tað verið rímiligt, at samkoman hevur ætlanir og mál.

Vit hava, sum so ofta nevnt, flutt okkum almikið gjøgnum tey seinastu 30 árini, og vónandi halda vit fram at flyta okkum. Seinastu mánaðirnar hava vit týðuliga kent, at nakað nýtt stendur fyri framman, men hvat tað er og hvussu tað sær út, vita vit ikki, men við vitjanini hjá Wayne Simmonds var okkum greitt, at hann málaði nøkur av framtíðarútlitunum fyri okkum, og hetta var sera sterkt og áhugavert.

Tað, sum eg dugi at síggja er, at vit hava og fara at flyta okkum aftur til byrjanina, og tá hugsi eg ikki um

# OKTOBER 2023

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sunnudagur | 1. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti við breyðbróting** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Áshild, Linjon og Eyðbjørg |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Tummas J. |
| | | | Lovsongsleiðari: Ingun, bólkur III |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Ása O. |
| | | | Kaffivertar: Áshild, Linjon og Eyðbjørg |
| Mánadagur | 2. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Regin |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Leygardagur | 7. | | **Reingerð:** Ingun og co. |
| Sunnudagur | 8. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Anton Petur, Fríðbjørn og Linda |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Anna May |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Alex |
| | | | Kaffivertar: Anton Petur, Fríðbjørn og Linda |
| Mánadagur | 9. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Hans |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Fríggjadagur | 13. | Kl. 20.00 | **ÍSRAELSMØTI** v/Shay Attias |
| Leygardagur | 14. | | **Reingerð:** Anna og co. |
| Sunnudagur | 15. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti við breyðbróting** |
| | | | **samanskot og myndir frá 50 ára veitsluni** |
| | | Kl. 13.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: No-omi, Marner, Helen og Sjúrður |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Sam |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Anna-May |
| | | | Kaffivertar: No-omi, Marner, Helen og Sjúrður |
| Mánadagur | 16. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Anna |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Leygardagur | 21. | | **Reingerð:** Conny og co. |
| Sunnudagur | 22. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti. Innsavnan til húsið** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Nora, David og Kári |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Ása L. |
| | | | Lovsongsleiðari: Ingun, bólkur III |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Sam |
| | | | Kaffivertar: Nora, David og Kári |
| Mánadagur | 23. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Sam |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Leygardagur | 28. | | **Reingerð:** Katy og co. |
| Sunnudagur | 29. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti við breyðbróting** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Áshild, Linjon og Eyðbjørg |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Mariann |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: |
| | | | Kaffivertar: Áshild, Linjon og Eyðbjørg |
| Mánadagur | 30. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J. |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.



## Ísraelsmøti 13. okt. 2023 kl. 20

Dr. Shay Attias, sum hevur vitjað í Føroyum fyrr, kemur aftur á vitjan at umboða Shuva Ísrael, og 13. okt. talar hann á møtinum í Filadelfia.

**Evnini Shay talar um eru:**
**Heimkoma jødanna og hvussu tað er at liva í Ísrael**, eins og stendur í Jer. 16:15.
**Tá Ísrael varð sett á stovn – eitt bíbilskt profeti, ið gekk út.** Sum Paulus skrivar í Róm. 11:1-2.
**Sameiningin millum norðrara og sunnara kongaríki í Ísrael.** Samb. 2. Krøniku-bók kap. 29.
**Holocaust – og støðan í Ísrael og Miðeystri í dag.** Sum er relevant fyri samkomuna at hoyra.